# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kanóndystir á skránni

**Hóast kappingin enn er ung, so skerst ikki burtur, at allir tríggir dystirnir um vikuskiftið tykjast rættiliga avgerandi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*


*Enn er kappingarárið ungt, men VÍF hevur alstóran tørv á tveimum stigum, tá teir taka móti oddaliðnum leygardagin*

Tá Neistin í 2000 vann seinasta FM-heitið hjá felagnum í manshondbólti, var tað júst í Vestmanna, at hetta var vunnið til høldar. Tað verður so ikki hetta umfarið, at Neistin fer at taka sær nakað FM-gull, men gongdin hjá liðnum hevur higartil bent á, at teir væl kunnu gera seg galdandi heilt uppi á ovasti rók í vetur.

Har plagar VÍF vanliga at halda til, men árið í ár hevur byrjanin tó ikki verið so sannførandi hjá liðnum. Móti H71 seinast bragdaði tó. Ikki minst tí Áki Olsen veruliga tykist vera um at finna stórformin. Og tað verður helst tørvur á skotstyrkini hjá bæði honum og øðrum við leygardagin. Higar til hevur Neistin kveistrað alla mótstøðu til viks. Og skulu vestmenningar ikki dragna í stríðnum um pláss upp móti oddinum, skulu stig fáast til høldar.

### Seinasta útkall hjá KÍF

Sunnudagin verða tveir dystir á skránni, og báðir tykjast teir serstakliga áhugaverdir.

Hóast Kyndil enn ikki hevur víst nakað meistaraspæl, so er liðið framvegis við frami í betru hálvuni av stigatalvuni. Og júst dystirnir móti StÍF kunnu verða teir, sum gera av, hvørt talan verður um finaluppláss ella ikki hjá meistarunum. At dystirnir millum júst tey bæði liðini eisini plaga at vera serstakliga undirhaldandi, ger ikki uppgerðina minni áhugaverda.

Og at enda er tað so dysturin millum H71 og KÍF. Hoyvíkingar hava veruliga víst tenn í fleiri dystum í ár, og ivaleyst munnu viðhaldsfólkini vóna, at hetta verður árið, har H71 veruliga kann taka tøk móti teimum meira siðvandu feløgunum.

Tað var í øllum førum tað, sum kollfirðingar ætlaðu sær, men higar til hevur so einki vilja borið til hjá teimum. Og skulu teir ikki dragna fullkomuliga, er treytaleysa kravið hesa ferð tvey stig.



# Besta liðið skal finnast

**Leygardagin 10. november verður Hoyvíkarhøllin karmur um árligu kappingina um føroyameistaraskapin í amboðsfimleiki fyri lið**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Tað er Fimleikasambandið, sum saman við Ljósinum og Havnar Fimleikafelag skipar fyri kappingini, ið verður skipað í tveimum. Fyrra kappingin er fyri kvinnu- og mansunglingar, kvinnur og menn, og byrjar kl. 12:00. Seinna kappingin er fyri pinkur, piltar, gentur og dreingir, og byrjar kl. 16:00.

Fimleikararnir fara at kappast í gólvíðkan, basic line, lopi, bita, forskotnari barr, paralell barr og í ringum. Ein partur av kappingini verður tó í fimleikahøllini í Rituvíkar skúla. Tað er kappingin í forskotnari barr hjá pinkum og gentum; tær fara at kappast fríggjakvøldið 9. november kl. 18:00.

Seinnu árini hava amboðsfimleikararnir fingið fleiri kappingar at fara til, og hetta gevur eyka venjing og royndir. Tað sæst eisini, at fimleikararnir eru nógv mentir seinastu tíðina, so tað verður spennandi at vita, hvussu leikur fer í ítróttarhøllini í Hoyvík leygardagin.